# Gekk sær kátur upp um heyg...

TINGHELLAN
*Mikudagskronikkin*
*Jógvan Olsen*
*havnemand@yahoo.dk*



Fólkaheilsan hongur saman við nógvum liðum av samfelagnum: ein áheitan á politikkarar og embætismenn um at taka fólkaheilsu og lívsvirði við í øllum ætlanum, ið gjørdar vera.

Henda greinin snýr seg um ymsar trupulleikar, sum nógv helst ikki halda hava við hvønn annan at gera. Men les kortini og døm aftaná!

Tað var gott at hoyra um nýggju ætlaninar hjá landsstýrismanninum í heilsumálum, Hans Paula Strøm, at bøta um fólkaheilsuna. Hetta varð kallað "Føroyska Fólkaheilsuætlanin 2005-15", og sambært henni skulu øll føroysk skúlabørn fáa ókeypis mjólk og frukt í skúlanum longu frá 1. januar.

Ætlanin er sera positiv og vónandi verður hon í framtíðini víðkað til skúlamat eins og í øðrum Norðurlondum við tilhoyrandi betri innlæringsevnum og minni stressaðum familjulívi.

Hetta er ein góð byrjan, men í hesum mugu vit ikki gloyma, at tað ringasta fyri fólkaheilsuna tó er royking og vantandi rørsla. Ikki vantandi ítróttur hjá ungum fólkum, men rørsla hvønn dag - alt lívið ígjøgnum.

Á sama hátt sum skúlamatur skal takast við í ætlanina fyri betri fólkaheilsu, so skal ferðsluplanlegging eisini. Fólkaheilsan eigur snøgt sagt at hugsast við í øllum liðum av samfelagsinnrættingini.

Sambært Sundhedsstyrelsen røra 20-30 % av fólkum seg so lítið, at tað er skaðiligt fyri heilsuna. Ongin orsøk er til at halda, at føroyingar røra seg meira enn fólk í øðrum londum, kanska heldur minni. Tað er næstan sum um føroyingar ofta "koyra bil" sum frítíðarítriv.

Føroyingar ganga og súkkla lítið og onki - eru beindovnir. Gamaní, brekkur eru, so tað kann vera tungt at súkkla, men avstandurin er sjáldan longri enn tað ber til at ganga.

Tað, ið munar mest, er at gera tað gjørligt at klára seg uttan at eiga ein bil. Tá ein bilur er tøkur, vera beinini nærum ongantíð brúkt sum flutningstól. Sjálvt smáørindi kunnu ikki longur klárast til gongu, tí tað vindur upp á seg - hetta við ikki at kunna ganga frá stað til stað.



*Hesar smágenturnar áttu at havt eina trygga gongubreyt at ferðast á. Myndin er tikin eitt hanagleiv frá einum skúla og einum barnagarði í Havn. Varðagøta hevur nógva ferðslu, hóast bilar ikki síggjast á hesi myndini*

### Hvat kann gerast?

Til ber at gera tiltøk, sum ikki kosta annað enn planðlegging, fyri at fáa fleiri fólk at ganga. Tá er tað aftur týdningarmikið at byrjast skal á ungum árum.

Líkasum børnini skulu læra at eta sunt, so skulu tey eisini læra at brúka beinini sum flutningstól so tíðliga sum gjørligt. Tað er tíverri soleiðis, at tey flestu, sum ikki hava bil, kortini fáa sær bil, tá tey fáa børn - og sleppa sær síðan ongantíð av við hann aftur. Hin vegin verða fólk, sum liva sín barn- og ungdóm uttan bil, ongantíð líka bundin av bilinum.

Tey, sum klára seg uttan bil, vita eisini, hvussu skjótt man venur seg við bilin. Tey flestu hava í styttri tíðarskeið havt bil og halda skjótt, at tað verður ómøguligt at klára seg uttan. Men tá gerandisdagurin uttan bil kemur aftur, vísir tað seg, at tað ikki eru so nógv ørindir, har bilurin er alneyðugur. Men hetta er tó treytað av, at man ikki skal ferðast langa leið við børnum til dagstovn og skúla.

Tí sigur tað seg sjálvt, at tað hevði verið ein stórur bati fyri fólkaheilsuna, um tað bar til at hava børn uttan at vera kroystur til at hava bil. Um atlit varð tikið til, at børn komu í dagrøkt ella á stovn í nánd av heiminum, tørvaðist flest ongum at havt bil - ella í hvussu so er ikki meira enn ein bil hvørt húskið.

Lat okkum taka eitt dømi frá veruleikanum: eitt húski, sum býr í Vesturbýnum; annað foreldrið arbeiðir í Hoyvík, hitt hevur skiftandi arbeiðspláss, trý børn eru ansað á hvør sínum stovni. Hesi eru noydd at hava tveir bilar og kunnu ikki so frægt sum klára seg við einum. Høvdu børnini hjá teimum verið á stovni í nánd av bústaðnum, høvdu tey kunna klára seg við einum bili - ella heilt uttan, um bussflutningurin bara hevði verið eitt sindur títtari.

Tað er ikki neyðugt, at øll tiltøk fyri fólkaheilsuna eru ókeypis, men summi kunnu vera og krevja bara umhugsni og ein breiðari sjónarring hjá teimum, sum gera støðið undir gerandislívinum hjá borgarunum.

### Vandamikið at ganga.

Allir vegir framvið skúlum áttu at havt 15 km/t ferðaravmarking. Sum nú er, koyra nógv foreldur børnini, tí skúlavegurin er ov vandamikil. Hetta økir sjálvandi um ferðsluna og ger skúlavegin uppaftur vandamiklari, so at øll foreldur noyðast at koyra børnini í skúla. Tað optimala hevði verið, at ongin vegur í nánd av skúlum hevði gjøgnumgangandi ferðslu. Í tí sambandi er tað bara viljin, sum manglar.

Hví skulu fótgangarar ikki verjast? Bilbeltini verja bara tey, sum koyra í bili. Hví skulu nógvir pengar brúkast uppá vakrar grótgarðar framvið landsvegunum, men ikki ein króna uppá at verja fótgangarar? Tað kann gerast við at gera verjugarðar av onkrum slag - grótgarðar ella flaggarðar - í bygdum øki, har bilarnir koyra skjótt, ella við at leggja gøtur longur burtur frá til gangandi og súkklandi. Summastaðni sæst, at flaggarðar eru gjørdir at verja grannar móti larmi og royki frá vegnum og ferðsluni. Hví vera gøtur tá ikki gjørdar innanfyri garðin, í staðin fyri at gera gongubreytina so tætt sum gjørligt upp at bilferðsluni? Onkuntíð skal so lítið til!

### Hvør eigur at gera nakað?

Landið eigur at gera sítt til at bøta um møguleikarnar fyri sunnari rørslu í gerandisdegnum, men landspolitikkararnir eiga eisini at áleggja kommununum á henda hátt at taka fólkaheilsuna við í planleggingina.

Tann síðsta utopiin: tær størru kommunurnar eiga at arbeiða fram ímóti, at onkrir býlingar verða undantiknir ferðslu við privatum persónbilum. Hetta eigur at vera sentralir, samanhangandi býarpartar. Hetta er ikki meira utopi enn so, at tað í mongum evropeiskum býum er heilt ella partvíst veruleiki. Nevnast kunnu Wien og Amsterdam. Tað eru ikki út av lagi vánalig fyridømi at hava.

Tey, ið eiga bil, brúka eisini bilin til ørindi, har tey saktans kunnu ganga. Tey, ið ongan bil eiga, røra seg munandi meira enn tey, ið eiga bil. Og nýggj granskíng vísir, at tað er sannlíkt, at tað er líka heilsuskaðiligt ikki at røra seg, sum tað er at roykja.

Tí er eitt tað besta tiltakið fyri fólkaheilsuna hetta: at gera tað gjørligt at klára seg uttan bil.



*Við bert einum sindri av umhugsni, kunnu fótgangarar verjast nógv betur. Her kundi gongubreytin líka væl verið uttanfyri flaggarðin*



*Nógvir pengar vera brúktir uppá vakrar garðar fram við størru vegunum, men ikki ein króna uppá at verja fótgangarar móti ampanum av bilferðsluni.*



# Viðmerking til Tinghelluna: Hvønn velur tú?

VIÐMERKING
*Annika W. Joensen*
*forkvinna í*
*Javnstøðunevndini*



Í Tinghelluni 30. oktober 2004 skrivar Kári á Rógvi áhugaverda grein um komandi kommunuvalini og umrøður kvinnulistar. Hann spyr, um kvinnur hava ein serligan máta at viðgerða mál uppá.

At svara spurninginum fari eg at citera Beintu í Jákupsstovu, granskara, sum beint undan kommunuvalinum í 2000 í fyrilestri 19. november í Havn greiddi frá hesum:

...()... "Tí alt bendir á, at tað hevur týdning fyri virksemið á tingi og í bý- og bygdaráðum, at eisini kvinnur eru har. Tað eru gjørdar nokkso nógvar vísindaligar kanningar, sum vísa, at kvinnur prioritera — raðfesta — øðrvísi enn menn. Ein kanning um norskar kommunupolitikkarar vísti t.d., at tað var størri munur á prioriteringum hjá kvinnum og monnum enn millum umboð fyri ymiskar politiskar flokkar — millum sosialistar og tey borgarligu. Kvinnurnar raðfestu mál sum skúla, barnagarð, mentan, heilsu- og socialmál hægri enn vinnumál, vegir og annað byggivirksemi — menninir beint øvugt.

Um vit skulu hava eitt livandi demokrati, er tað heilt avgerandi, at vit sum borgarar halda, at stýrið er legitimt, at vit hava tann tryggleika, at politiskar avgerðir verða tiknar á beinan hátt. Kommunan er ikki bara ein stovnur, sum skal syrgja fyri tænastum, kommunan er ein politiskur felagsskapur. Sum borgarar mugu vit vera sannførd um, at tað eru fólksins umboð, sum avgera, hvat skattapengarnir verða brúktir til; vit mugu hava álit á politikkarnar, at teir hugsa um alla borgarafjøldina, og ikki bara seg og síni. Men verðin er mangfoldig, og helst vilja vit hava umboð, sum síggja verðina frá okkara sjónarhorni. Tað er ein fyrimunur, at býráðið er representativt. Kvinnuverðin er ofta øðrvísi enn mannsverðin. Tí eiga kvinnur at stilla upp til val, og til valið sjálvt hava tær, sum hava stillað upp, uppiborið eiin kross á atkvøðuseðilin fyri ta uppgávu, tær vilja taka á seg."...()...

Citat liðugt.

Annars undrar tað meg, at Kári á Rógvi spyr, hvat vit høvdu sagt til m.a. mannslistar? Tað er júst tað, vit í Føroyum hava verið von við, og ein beinleiðis orsøk til, at kvinnulistar komu. At kvinnurnar bert stilla upp fyri aðru helvtina, sum sagt verður, má vera ein misskiljing. Tað vildi jú merkt, at menninir, sum higartil hava rátt, bara hava stillað upp fyri sína helvt. Kvinnurnar stilla upp fyri at fáa innlit og ávirkan og fyri at skapa javnvág. At menn og kvinnur í felag seta dagskránna og viðgera mál, er til tað besta fyri alt fólkið, ikki bert helvtina.

Og at enda haldi eg ikki, ein kann sammeta kvinnulistar við samkomulistar. Kvinnur eru umleið helvtin av landsins íbúgvum, hvørki ein áhugabólkur ella ein minniluti.

# Hoydals-doktrinin

TINGHELLU-KRONIKKIN
*Finnbogi Ísakson*



Ikki ætli eg mær at leggja meg út í tað stríð, sum tók seg upp herfyri millum eysturoyartingmann Tjóðveldisfloksins Torbjørn Jacobsen og floksformannin Høgna Hoydal. Vit, sum standa uttanfyri, kunna í mesta lagi hava ein illgruna um, at okkurt annað býr undir hesi ósemju enn bara tað, sum hevur staðið í bløðunum.

Harafturímóti dugi eg ikki at lata vera við at gera viðmerkingar til avleiðingarnar av hesi ósemju. Mær tykir rætt og slætt, at bæði tingmanning og Aðalstjórn Tjóðveldisfloksins eru óðar í høvdinum. Royndirnar, sum flokkurin hevur av at ekskludera fólk, eru sera, sera ringar, og sárini vórðu so djúp, at tey eru kanska ikki heilt grødd enn — mong ár aftaná. Ta ferðina var ikki talan um at koyra ein tingmann úr tingbólkinum, men ein uttantingslim úr flokkinum. Dømini um, at tingmaður er koyrdur úr einum tingbólki, eru fá í Føroyum. Eitt dømi er, at Javnaðarflokkurin eksluderaði Jákup í Jákupsstovu í 1946, tí hann í sjálvstýrisstríðnum fór í part við Fólkaflokkinum.

Í grannalondunum er floksdisiplinin nógv strangari enn í Føroyum. Taka vit Danmark sum dømi — tað gera vit jú altíð — so hava danir gjørt herskyldu, har teir hava lært "kæft, trit og retning". Tann lýdnislæran fylgir teimum restina av lívinum, eisini teimum sum sleppa upp í part inni á Christiansborg. Tað er misjavnt, hvussu strong floksdisiplinin er, men taka vit sosialdemokratiska flokkin sum dømi, so man vera minni munur á tí valdi, floksformaðurin har hevur, og tí valdi, sum aðalskrivarin í sovjettiska kommunistaflokkinum plagdi at hava. Teir meinigu tinglimirnir eru í roynd og veru lítið annað enn atkvøðuneyt. Sleppa sjáldan at taka orðið í tingsalinum enntá.

Í Føroyum hevur individualisman havt víðar ræsur í Tinginum. Tað hevur td als ikki verið óvanligt, at ikki allir í einum flokki atkvøða eins. Tað merkir tó ikki, at einki samanhang er í flokkinum. Tá tað kemur til stórmál, prinsippmál, verður tað illa tolt, at tingmaður gongur ímóti floksins stevnuskrá. Men sum sagt hevur tað sjáldan fingið ta avleiðing, at nakar er koyrdur úr flokkinum.

Nú er skilið øðrvísi í Tjóðveldisflokkinum. Har hava og skula høvd rulla, um floksformaðurin Høgni Hoydal heldur, at soleiðis eigur tað at vera. Hann var høvuðsmaður, tá Signar á Brúnni varð noyddur úr Landsstýrinum, og hann er eisini høvuðsmaður nú, tá Torbjørn Jacobsen varð noyddur úr tingbólkinum.

Tað er við vilja, eg nýti orðið "noyddur" og ikki "koyrdur". Tí snildið hjá Høgna Hoydal er júst tað, at hann so ella so noyðir fólk til viks, sum honum ikki hóvar. Hann syrgir ikki fyri, at tey verða "koyrd". Eftir sálarligt trýst í tímar og dagar kendi Signar á Brúnni seg "noyddan" at siga seg úr Landsstýrinum. Aftaná kundi floksformaðurin verja seg við, at hann var ikki "koyrdur" úr Landsstýrinum. Hann hevði sagt seg frá.

Nøkulunda tað sama hendi nú. Eftir at fjølmiðlarnir høvdu tráspurt tjóðveldisfólk, um Torbjørn Jacobsen fór at verða koyrdur úr flokkinum, tóktist tað greitt, at hvørki í tingmanning ella Aðalstjórn var hugur fyri at fremja eitt so drastiskt stig. I staðin fekk floksformaðurin alla tingmanningina at skriva undir eitt tíðindaskriv, har tað millum annað stendur:

"Frameftir verður mannagongdin tann, at tingfólk, sum í fjølmiðlunum fremur persónsálop á annað tingfólk, setur seg uttan fyri tingbólkin."

Var eg tingmaður, hevði eg aldrin í verðini skrivað undir hesa Hoydals-doktrinina. Her verður talu- og skrivifrælsið hjá hvørjum einstøkum tingmanni Tjóðveldisfloksins bundið niður. Ónøgd við eitt nú floksformannin skal ikki undir nøkrum umstøðum koma út til almenningin. Og hvør skal gera av, nær talan er um "persónsálop", og nær talan er um annað álop?

Tjóðveldisflokkurin hevur verið meira opin enn aðrir flokkar. So at siga hvørja ferð, ein ósemja hevur tikið seg upp, er tað komið út til almenningin. Tað haldi eg vera gott. Eisini tann meinigi veljarin, limur í einum valfelag ella ikki, eigur at kenna til viðurskiftini í flokkinum og hava møguleika at gera sær sína meining um tað, sum fyriferst.

At Tjóðveldisflokkurin hevur fingið nógva umtalu sum flokkurin, har ósemjur taka seg upp, merkir als ikki, at ósemjur ikki hava verið í øðrum flokkum. Í mong ár var stór ósemja í Sambandsflokkinum millum bólkin hjá Kristiani Djurhuus og Samuelsenbólkin. Í Fólkaflokkinum var vónandi stór ósemja millum Jógvan Sundstein og Óla Breckmann. Í Javnaðarflokkinum sótu Øregaard og Petur Mohr Dam/ Atli P. Dam ikki altíð so væl um sátt. Í Sjálvstýrisflokkinum var stríð millum Jóannes Patursson og Jóhan Hendrik Winther Poulsen úr Skopun, sum kanska varð koyrdur úr flokkinum.

Hesar og aðrar ósemjur komu ongantíð alment fram í fjølmiðlunum, men øll, sum fylgdu hampiliga væl við í politikki, vistu um tær.

Tjóðveldisflokkurin eigur nú sum fyrr at tola, at ósemjur taka seg upp og verða demokratiskt viðgjørdar í fjølmiðlunum. Eitt høvuðsstarv hjá einum floksformanni er annars at duga so mikið nógv av diplomati, at tað ongantíð kemur so langt, at ein tingmaður kennir seg noyddan at fara í fjølmiðlarnar við innanhýsis viðurskiftum.

Tað, sum nú verður sett í verk, er ódemokrati. Tað er komið fram, at ikki øll tingmanningin tók undir við at fara so harðliga fram. Hvat nú, um onkur, sum ikki tók undir við hesum, skrivar nøkur hvøss orð um Høgna Hoydal. Hevur hann/hon so eisini sett seg uttan fyri tingbólkin? Hvussu lítil verður so Tjóðveldisflokkurin á Tingi, tá valskeiðið er runnið?

Míni ráð eru, at bæði tingmanning og Aðalstjórn taka sær annað skinn um bak, seta Hoydals-doktrinina úr gildi í stundini og lata Torbjørn Jacobsen verða verandi í tingmanningini.